LM-084/2020

Fylgiskjal 2

Dátueftirlitið

Fíggjarmálaráðið
Tinganes
Postrúm 2039
100 Tórshavn

Tórshavn, tann 4. januar 2021
J.nr: 20/00327-3
Tykkara skriv: 20/00427
Málsviðgeri: BS

Viðvíkjandi uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um toll

Fíggjarmálaráðið hevur sent Dátueftirlitinum uppskot um broyting í tollógini til ummælis. Dátueftirlitið hevur hesar viðmerkingar:

§ 28, stk. 8 í lógaruppskotinum áleggur fyritøkum, ið reka ferðafólkaflutning o.ø. ein skyldu at lata tollvaldinum tøkar upplýsingar um ferðafólk og manning til tolleftirlitsendamál. Ásett er, at landsstýrismaðurin kann gera reglur, so tollvaldið kann fáa "atgongd til skipan hjá flutningsfelag ella at upplýsingarnar skulu gerast tøkar fyri tollvaldinum elektroniskt í serligum formati."

Við hesum kann tollvaldið fáa beinleiðis atgongd til skipanir hjá flutningsfeløgum. At geva myndugleikum beinleiðis atgongd til skipanir við persónupplýsingum eigur bert at verða brúkt í einstøkum førum og við varsemi, m.a. tí, at hetta hevur við sær, at annar enn tann, sum hevur savna upplýsingarnar fær atgongd til tær. Sambært siðvenju hjá Dátueftirlitinum skal slík beinleiðis atgongd í útgangsstøðinum heimilast í lóg.

Sambært lógaruppskotinum er orsøkin til ásetingina, at tollvaldið skal føra eitt virkið tolleftirlit.

Í dag eru nøkur flutningsfeløg, ið flyta ferðafólk til og úr Føroyum. Tað kann tó hugsast at fleiri flutningsfeløg í framtíðini leggjast afturat. Hetta hevur við sær, at tollvaldið í framtíðini skal sleppa framat enn fleiri skipanum.

Dátueftirlitið skal vísa á, at hóast tollvaldið við lóg fær beinleiðis atgongd til skipanir, skulu vanligu reglurnar í dátuverndarlógini fylgjast. Hetta hevur við sær, at tollvaldið (TAKS) er dátuábyrgdari fyri tær persónupplýsingar, ið verða viðgjørdar til eftirlitsendamál. Hetta merkir, at TAKS skal uppfylla vanligu treytirnar um t.d. trygd í sambandi við viðgerð. Hetta hevur m.a. við sær, at:

- TAKS skal hava tøknilig trygdartiltøk uppá pláss, undir hesum nýtslu av tryggum sambandi og neti, antivirus, firewall o.s.fr. TAKS skal harumframt tryggja bygnaðarlig, undir hesum fysisk, tiltøk.
- TAKS skal bara hava atgongd til neyðugar upplýsingar, og atgongdin skal verða avmarkað til ávís starvsfólk, sum fáa egnan brúkara.
- Atgongdin verður loggað.
- TAKS skal hava greiðar mannagongdir fyri atgongd, og hvør fær upplýsingarnar.
- Upplýsingarnar skulu ikki brúkast til onnur endamál enn tolleftirlit og eiga ikki at at verða givnar víðari til onnur.
- TAKS skal hava innanhýsis reglur um eftirlit við t.d. loggið.

Dátueftirlitið

Dátueftirlitið ásannar týdningin av, at tollvaldið skal kunna útinna sítt eftirlit, og at hetta í løtuni skal gerast við beinleiðis atgongd til skipanir hjá flutningsfeløgum.

Í viðmerkingunum til § 28, stk. 8 stendur m.a.

> *"Tollvaldið fær í dag ikki allar upplýsingar, sum eru neyðugar til tolleftirlitið og fær heldur ikki upplýsingarnar á ein hátt, sum er nøktandi til at gera tað neyðuga greiningararbeiðið fyri at hava eitt nøktandi tolleftirlit. Tað at atgongdin til upplýsingar fæst á ymsan hátt, og at upplýsingarnar ikki eru skipaðar einsháttað ger tað trupult at hava eina einsháttaða viðgerð og at tað er sera trupult at gera eina váðagreining í nóg góðari tíð til at kunna tryggja eitt nøktandi fysiskt eftirlit, tá fólk koma."*

Flutningsfeløgini hava ymiskar skipanir, ið tey brúka til teirra umsitingarliga tørv. Um tollvaldið skal hava atgongd til hesar skipanirnar, fær hetta umsitingarligar avleiðingar fyri bæði TAKS og flutningsfeløgini.

Dátueftirlitið mælir tí til, at tollvaldið við tíðini fær egna KT-skipan til nevndu váðagreiðingar. Eina KT-skipan sum móttekur tær kravdu upplýsingar, ið tollvaldið hevur tørv á, talgilt. Hetta er hátturin sum grannalond okkara leggja seg eftir, og sum eisini er møguligur við lógaruppskotinum.

Fleiri fyrimunir vildu verið við tílíkari loysn. M.a. verður greitt fyri teimum ferðandi, hvør dátuábyrgdarin er, og til hvønn viðkomandi kann venda sær til, ynskir hann at brúka síni rættindi. Tað vildi læt um eftirlitsarbeiðið hjá tollvaldinum fanst ein savnandi skipan, ið móttekur allar viðkomandi upplýsingar frá øllum flutningsfeløgum.

At enda skal Dátueftirlitið vísa á, at tað fleiri ferðir í viðmerkingunum verður vist til persónsupplýsingarlógina. Hetta eigur at verða rættað til dátuverndarlógina, sum kom í gildi 1. januar 2021.

Vinarliga

Katrin Thorsvig Hansen

LM-084/2020